# Familjudagur í Hvalvík

**Leygardagin var familjudagur í Hvalvíkar skúla, har børn og foreldur hugnaðu sær við undirhaldi, kappingum og spølum**

FAMILJUDAGUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Trý ára gamla Fríða verður málað um andlitið, so hon sær út sum ein fitt lítil kiska. Mildrið hevði úr at gera, og bíðrøðin at sleppa framat hjá henni var long*

Tað var lív í skúlanum í Hvalvík leygardagin, har børn og vaksin vóru komin saman til familjudag.

Á skúlaloftinum var undirhald við Absalon, Nikláa og Ásbjørn, og teir fangaðu sanniliga áhugan hjá bæði børnum og vaksnum.

Umframt fleiri spøl og kappingar var eisini kókukapping á skránni. Spenningurin var stórur um, hvør kaka nú mundi fara at fáa flestar atkvøður, og aftur hesaferð var tað Marjun Friálvsdóttir, sum fór avstað við vinninginum.

Endamálið við familjudegnum er, at foreldur og børn skulu kunna hugna sær saman, uttan at tað skal kosta ov nógv.

Tað eru seks kvinnur, ið hava tikið seg saman, og hava í nakrar vetrar skipað fyri frítíðarítrívi fyri børnum. Av og á verður eisini skipað fyri ymiskum tiltøkum, fyri bæði børn og vaksin, eitt nú tunnusláing og jólahugna.

Eina tíð húsaðust tey í Streymahúsinum, men í vetur er ætlanin at nýta missjónshúsið til ítriv hjá børnunum.

Í løtuni samráðast tær um at sleppa at byggja eina hædd omana á bygningin, sum skal byggjast til umklæðirúm við nýggja fótbóltsvøllin í Streymnesi.

Fólk hava tikið sera væl undir við hesum tiltøkum og hava møtt fjølment upp.



*Annika hevur skálkin aftanfyri oyra og er ikki so løtt at lumpa*



*Tað var lív í á skúlaloftinum í Hvalvíkar skúla leygardagin, tá Absalon, Nikláí og Ásbjørn undirhildu*





*Aftur hesaferð var tað Marjun Friálvsdóttir, sum fór avstað við vinninginum fyri vakrastu køkuna. Naina Jacobsen handar henni ein lagkøkuknív í virðisløn. Gentan við liðina av Marjun eitur Bjørg og býr í Æðuvík, hon var so heppin at ogna sær vinnarakøkuna á mexikanskari uppboðssølu*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Til urtagarðin



Snjóklokka

Ymisk sløg av blómuleykum

Mánadag - fríggjadag kl. 13.00-18.00
Leygardag kl. 11.00-14.00
Annars eftir avtalu

Hanne-Dot
Landavegur 38 · 100 Tórshavn · Tel 215950

Sosialurin
Sosialurin
i
Sosialurin
Sosialurin



**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apr-98, Km 28.000. Top modell: Bert koyrt 28.000 km Klimaanlegg, Leðurinntrekk, Sóltak, El-rútar, El-spegl, Fj.-stýrt Centrallás, Radio, Alufelgur, Spoylarar v.m. Sertilboð kr. 198.000.



**KIA CARNIVAL 2.9 HPDI EX MODEL**
Árg Mar-02, Km 195.000. Top modellið: Aircondition, Automatgear, Regnsensor, El.-stýrt førarasetur, El-rútar fr.+ aftan, El.spegl, Fjarstýrt centrallás, Hita í forrúti, C.D.anlegg-Mjørkal.-Leður róður v.m. (Nýprísur: 325.800,-). Kr. 218.000.



**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg Apr. 1999, Km 71.000. El-rútar fr.- Valnød Instrumentbretti, Takboylar, Sleipikrók v.m. Kr. 86.000.



**OPEL ASTRA 1.6 STC. VØRUVOGNUR**
Árg Apr. 1999, Km 28.000. Bert koyrt: 28.000 km, Fjarstýrt centrallás, Radio v.Bandspælara, Takboylar v.m. Kr. 75.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR 4 HJÓLSTREKK**
Árg Mar-98, Km 63.000. Bakkisensor - 4 WD v.Reduktiónsgear, Fjarstýrt centrallás, El-rútar, El-spegl, C.D.Anlegg v.m. Kr. 118.000.



**NISSAN ALMERA 1.6 GX**
Árg Maj 1998, Km 61.900. Alufelgur, C.D.Anlegg, Fjarstýrt centrallás, El-rútar, El. Spegl v.m. Kr. 98.000.



**TOYOTA AVENSIS TURBO DIESEL**
Árg Aug-00, Km 147.000. Aircondition, Fjarstýrt centrallás, El-rútar, C.D.Anlegg v.m. Kr. 124.000.



**ROVER 620 TURBO INJECTION 200 HK**
Árg Jul-99, Km 94.000. Top modellið: 200 HK Turbo -Leður Inntrekk, Sóltak, Aircondition Alufelgur, C.D.-Anlegg v.m. Kr. 168.000.



**LAST TIL PICK UP BILAR**
Sum nýggj Pick up Last við síðulúkum/aftan (MVG fæst aftur av prísinum). Kr. 4.500.

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**

